# Skriðulop rakti hús og bilar

*Eitt ógvusligt skriðulop omanfyri Kjalarvegin í Klaksvík gjørdi stóran skaða á eini sethús og tveir bilar. Vegurin mátti steingjast, og fólk flytast burtur*



*Hesi húsini við Kjalarvegin fingu stóran skaða av ógvusligum skriðulopi í Klaksvík mánadagin. Tveir bilar, sum stóðu við húsini, vórðu eisini raktir av skriðulopinum.*
**Mynd: PhotoCare**

EYÐUN KLAKSTEIN

**Klaksvík:** Støðan í Klaksvík gjørdist so hættislig í nógva regninum mánadagin, at fólk máttu flytast burtur av ovasta vegnum á eystursíðuni.

Fleiri skriðulop vóru, og tað ógvusligasta av teimum gjørdi stóran skaða á eini sethús og tveir bilar við Kjalarvegin. Harafturat fleyt yvir kring allan býin, vegir stóðu undir í vatni, hús fingu vantskaða, og løgreglan ráddi fólk frá at koyra.

Sløkkiliðið í Klaksvík, arbeiðsfólk hjá kommununi og onnur stríddust allan seinnapartin og út á kvøldið mánadagin við nógv vatnið, sum fleyt kring býin. Og býráðið í Klaksvík varð kallað saman mánakvøldið at viðgera støðuna.

### Kona tikin við

Ógvusligasta hendingin var við Kjalarvegin, sum er ovasti vegurin á eystursíðuni. Fleiri skriðulop vóru á eystursíðuni, og tað ógvusligasta av teimum rakti eini hús við vegin. Jørð og grót fóru ígjøgnum hjallin, sum standa omanfyri húsini, og inn í húsini.

Konan í húsinum var akkurát á veg út í bilin, tá skriðulop kom. Hon var í ferð við at rýma av húsum við soninum og einum øðrum dreingi, sum vóru í bilinum niðanfyri húsini. Konan var tikin við av skriðulopinum, men kom burtur úr tí uttan stórvegis snuddir. Hon fekk dreingirnar úr bilinum, sum ikki varð veruliga raktur av skriðulopinum, tí hann stóð undir garaguni, og slapp sær burtur.

Tveir aðrir bilar, sum stóðu fram við húsunum fingu stóran skaða. Teir endaðu báðir mitt úti á vegnum av stóra trýstinum frá skriðulopinum, og annar hevði fingið ein part av einum stakitti sendandi ígjøgnum forrútin.

### Hús fingu vatnskaða

Eini 30 fólk, sum búgva við Kjalarvegin, rýmdu av húsum, tí vandi var fyri fleiri skriðulopum, og arbeiðsfólk hjá kommununi og onnur fóru í holt við at rudda vegin, sum var undir í jørð og gróti. Hetta arbeiðið helt fram fyrrapartin í gjár.

Tað helt fram við at oysa niður út móti mánakvøldinum, og støðan var hættislig fleiri staðni í býnum.

Nógv vatn rann á vegnum, og saman við vatninum kom eisini jørð og grót. Fjósabrekkan, sum gongur oman frá Kjalarvegnum, fekk so nógvan skaða í áarførinum, at hon varð stongd. Biskopstøbrekkan stóð eisini undir, og við Alfa Bókhandil varð sløkkiliðið í Klaksvík noytt at seta pumpur til fyri at fáa vatnið burtur frá húsinum.

Vatnið steymaði norður eftir Nólsoyar Páls gøtu, og bilrøðirnar vóru stundum langar, tí tað bar illa til at koyra eftir vegnum. Eisini á Helnabrekku fossaði vatn eftir vegnum og oman eftir Skáltavegnum og Garðabrekku, og ymsastaðni á eystursíðuni fingu hús vatnskaða.

Móti kvøldið sleit í, og vatnið rann síðani undan næstu tímarnar, men eftir lá jørð, grót, sandur og annað, sum var komið við áarførinum. Í gjár varð so farið undir uppruddingararbeiðið, sum kemur at taka fleiri dagar.



*Skriðan ið kom oman yvir býlingin á Gørðum í Klaksvík hómast í baksýni*
**Mynd: Photo Care**



# Umfatandi skaðar í Klaksvík

*Tað fer at kosta Klaksvíkar kommunu fleiri milliónir krónur at gera skaðarnar aftur eftir áarføri mánadagin*

EYÐUN KLAKSTEIN

**Klaksvík:** Skaðarnir av áarførinum og skriðulopunum í Klaksvík mánadagin eru so umfatandi, at tað fer at kosta fleiri milliónir krónur at gera vegir, gongubreytir og annað aftur.

Fyrrapartin í gjár hittust ábyrgdarfólk hjá Klaksvíkar kommunu og sløkkiliðnum fyri at gera eina fyribils meting av skæðunum, sum hendu mánadagin. Eisini var uppruddingararbeiðið lagt til rættis.

Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík, metir, at umvælingarnar fara at kosta fleiri milliónir krónur, og at tað fer at taka drúgva tíð at fáa alt í rættlag aftur.

### Sløkkiliðið hjálpa til

Nógvir vegir hava fingið skaða, gongubreytir somuleiðis, og á Helnabrekku er mest sum allur vegurin farin. Úti í Grøv er nógva av arbeiðnum, sum er gjørt fyri at fríðka um økið, farið fyri skjeyti.

Ætlanin er nú, at tekniska nevnd hjá Klaksvíkar býráði skal gera eina meira neyva meting av, hvussu nógv uppruddingar- og umvælingararbeiðið fer at kosta. Men fólk hjá kommununi eru farin í holt við mest átrokandi uppgávurnar eftir mánadagin, og seinnapartin í gjár skuli sløkkiliðið í Klaksvík eisini fara upp í uppruddingarbeiðið.




*Hesin bussurin er ikki á veg til útróðrar, men royndi at koma fram í vátu Klaksvíkini mánadagin*
**Mynd: Photo Care**



*Áirnar stóðu á tremur og fóru uppum áarbakkan longur oman tær komu*
**Mynd: Photo Care**



*Nógvastaðni bilti at koyra orsakað av nógva vatninum.*
**Mynd: Photo Care**